

sum undirritaðu uttan tann stóra áhugan fyri privatlívi Mikines´.

## Villur

Ikki er lætt at sleppa undan villum í so umfatandi verki sum hesum, men tíverri misprýða tær kanska í serligan mun júst í einum so prýðiligum verki og her eru veruliga ov nógvar. Villurnar eru í stóran mun slagvillur, vantandi bókstavir og líknandi smáputl, men tað ørkymlar og fær lesaran at steðga á í lestrinum. Málsliga er eisini okkurt, ið ørkymlar, t.d. ovurnýtslan av fyrra lýsingarhátti, vanliga nevndur nútíðarlýsingarháttur: "Men Anna Kathrina má eisini hava verið sálarsterk kona, ið skuldi bera stórar líðingar, missandi tvey børn og mannin í bestu árum, umframt at missa elsta sonin til kjøtgrýturnar í Keypmannahavn. Nakað sæst til hesa styrki í fotomynd av henni roytandi lunda...". Hesin eitt sindur møsnuti skrivihátturin er tíanverri ráðandi í tekstinum, sum tykist grundaður á ein varhuga av alfevnandi týdninginum, sum privatlívið hevur fyri listina. Eg má siga akkurát sum er; drukktúrar, nervatablettir og húðsjúka kunnu gera mær tað sama. Tað er listin hjá Mikines, hansara verk og tær listarligu ávirkanirnar sum hava mín áhuga og eg havi ringt við at skilja, at tað symbolistiska og ekspressionistiska árinið verður so lítið viðgjørt sum tað verður í nýggju stóru Mikines-bókini. Onkrastaðni er teksturin ringur at skilja, m.a. vegna mótsagnir sum t.d. í kapitlinum um Parísferðina, har tað fyrst verður staðfest, at Mikines gjørdi lítið burtur úr teim mongu mentanartilboðum, sum býurin hevði at bjóða uppá og síðan verður lagt aftrat: "Tá ið hann ikki var inni á kamari sínum og málaði vatnlitamyndir úr Mykinesi, tykist Mikines hava savnað seg um tey stóru listasøvnini, serliga Louvre... Louvre gav Mikines nóg mikið til eitt heilt lív...". Tað er eisini eitt sindur troyttandi í øllum førum fyrstu ferð, tú lesur tekstin, at Preben Wilmann ikki verður presenteraður fyrr enn 9. ferð hann er nevndur.

## Dygdir

Ein so rúgvusmikil tekstur sum tann hjá Aðalsteinn Ingólfsson hevur sjálvandi eisini dygdir, treyðugt so. Tildømis tykist hann sera nærlagdur í síni viðgerð og hevur eitt nú funnið fram ymsar keldur, sum yvirritaða ikki áður visti um, eins og hann hevur spurt seg fyri hjá áhugaverdum og relevantum heimildarfólkum. Áhugavert er t.d. at lesa um ferðirnar hjá Mikines og um tey listafólk og verk, hann læt seg ávirka av og í so máta er eitt nú. kapitlið um grindadrápsmyndirnar sera upplýsandi og gott. Tað er eisini stuttligt at lesa, at Mikines dámdi tey eldru verkini hjá Niels Kruse og at hann sá Jack Kampmann sum ein kappingarneyta. Bókin er harumframt á tremur í áhugaverdum myndum, harav fleiri ikki áður eru sæddar á prenti. Kapitlið, ið snýr seg um tey seinnu árini, er serliga áhugavert og viðkomandi, serliga tá Ingólfsson ger upp við tað býttisligt lyndi, sum hevur verið í Mikines-bókmentum til at síggja orsøkina til listarligu afturgongdina í myndum Mikines´ frá miðskeiðis til seinast í 1960´unum í, at myndevnini hesa tíðina vóru donsk. Orsøkina metir Ingólfsson vera at finna í tí heldur skrambluta livihættinum hjá Mikines hesi árini og vísir við hesum, at summir ævisøguligir upplýsingar kunnu brúkast á skynsaman hátt... við máta.